gult cyan magenta svart



# Mangla pengar til kirkjuna á Eiði

**Pengarnir hjá Kirkjuráðnum á Eiði eru uppi, men framvegis manglar umleið ein millión krónur í at gera umvælingarnar í kirkjuni lidnar**

KIRKJA
*Eyðun Klakstein*

**Eiði:** Arbeiðið var upprunaliga mett til at kosta millum hálva og eina millión krónur, men higartil hevur tað kostað eina millión, og tað restar framvegis líka nógv í, áðrenn arbeiðið er liðugt.

Hetta er støðan í kirkjuni á Eiði, sum hevur verið stongd í eitt ár, meðan stóru umvælingarnar hava verið í gongd.

Kirkjan á Eiði er 120 ára gomul, og tí eru treytir fyri, hvussu umvælingar skulu gerast. Millum annað var tað eitt krav, at gamla tilfarið í gamla gólvinum í kirkjuni skuldi brúkast saman við tí nýggja.

Nú gólvið er pussað vísir tað seg, at gamli parturin av gólvinum kann ikki brúkast og má skiftast seinni.



*Gólvið í Eiðis Kirkju hevur volt kirkmyndugleikunum høvuðbrýggj*

*Mynd: Edvard Joensen*

## Pengarnir uppi

Stóra arbeiðið, sum er eftir at gera, er at mála kirkjuskipið og gera ein kórvegg í stand.

Saman við øðrum arbeiðið kemur upphæddin, sum krevst fyri at gera ætlaða umvælingararbeiðið liðugt, helst upp á eina millión krónur.

– Vit hava brúkt allar okkara pengar til hetta arbeiðið, og vit eiga ikki fyri tað, sum er eftir at gera, sigur Hans Edvard Høghamar, formaður í Kirkjuráðnum á Eiði.

– Vit høvdu vónað at sloppið í kirkjuna aftur á páskum og havt konfirmatiónirnar har, men tað fer ikki at eydnast. Um máliarbeiðið verður gjørt beinanvegin, sleppa vit kanska í kirkjuna aftur hálvan mai, sigur hann.

Men til tað krevst, at pengar verða funnir til arbeiðið.

Í komandi viku skal fundur verða Føroya Stiftsstjórn um eina loysn av fíggjarliga partinum, so kirkjan kann umvælast liðug og latast uppaftur.

Meðan kirkjan hevur verið stongd, hava fólk á Eiði brúkt missiónshúsið í bygdini.





**Ert tú tann rætti ... ?**

Hevur tú hug at vera í einum mennandi, avbjóðandi og kravmiklum umhvørvi, sum setur krøv til bæði tínar fakligu og persónligu eginleikar ?

Sum næmingur í Føroya Sparikassa fært tú eina fjølbroytta og áhugaverda útbúgving innan peningastovns- og viðskiftatænastu. Tú fært kunnleika til at veita bæði privatum og virkjum fíggjarligar tænastur og ráðgeving í einum hátøkniligum umhvørvi.

Hetta gevur tær eisini førleika at starvast innan aðrar vinnur ella sum liður í víðari útbúgving. Tó fara vit sjálvandi at stremba eftir, at tú framhaldandi ert ein av okkara, tí arbeiðið er mennandi og avbjóðandi. Hevur tú áræði, hava vit fleiri tilboð um víðari útbúgving innan fíggjarøkið.

**Næmingatíðin**
Í næmingatíðini luttekur tú í prógvgevandi lærugreinum, samstundis sum tú gongur í peningastovnsskúla. Næmingatíðin er 2 ár. Byrjað verður 3. september 2001.

**Útbúgvingarkrøv**
Umsøkjarar skulu hava lokið HH-, students-, HF- ella tilsvarandi prógv. Eisini næmingar, ið taka prógv í summar, eru vælkomnir at søkja.

**Fleiri upplýsingar**
Fáast við at venda sær til Steinbjørn Hardlei, starvsfólkaleiðara.

**Umsóknin**
Send umsóknina við avriti av próvskjølum til niðanfyristandandi adressu, so hon er okkum í hendi í seinasta lagi 4. apríl 2001 kl. 16.

FØROYA SPARIKASSI
Starvsfólkadeildin Yviri við Strond 2 100 Tórshavn Tel 348 000 Fax 348 453
E-mail: steinbjorn.hardlei@sparikassin.fo www.sparikassin.fo


## Eldur í ruskspann

**Klaksvík:** Hóskvøldið um hálvgum seks tíðina vóru boð eftir sløkkiliðnum í Klaksvík.

Orsøkin var, at eldur var í køkinum í einum sethúsum við Stoksoyrarvegin.

Tað vísti seg, at eldur var komin í ruskspanninum undir borðinum í køkinum, men talan var ikki um álvarsaman eld. Ruskspannin var tikin út úr húsunum, og so var søgan um eldin av.

Hinvegin hevði eldurin sett hol á vatnslangurnar undir borðinum, og vatnlekin gjørdi nakað av skaða. Sløkkiliðið hevur tól til at taka vatn upp við, og tað varð brúkt í húsunum.

Í ruskspannini vóru onkrir kemiskir løgir, sum eru illgruna fyri at verða orsøkin til eldin.

**ek**



# Norðoya Sparikassi stórt avlop

**Góður fiskiskapur og góðir fiskaprísir eru grundarlagið undir góða úrslitinum hjá Norðoya Sparikassa, sum farna ár hevði 19,3 milliónir í avlopi áðrenn skatt**

ROKNSKAPUR
*Eyðun Klakstein*

**Klaksvík:** Í gjár kundi Eyðfinn Reyðberg leggja sín fyrsta roknskap sum stjóri í Norðoya Sparikassa fram.

– Vit eru heilt væl nøgd við úrslitið. Fyrra hálvár høvdu vit 4,3 mió. í avlopi, men seinna hálvár royndist munandi betri, sigur Eyðfinn Reyðberg.

Norðoya Sparikassi hevði 19,3 milliónir í avlopi áðrenn skatt, men tá landið hevði fingið sín part, vóru 15,7 milliónir eftir í sparikassanum.

Hetta úrslitið er nakað tað sama sum í fjør, men áðrenn skatt var úrslitið í ár næstan hálvaaðru millión betri.

## Fiskvinnan avgerandi

Tað eru serliga norðoyingar og fólk í Lorvík, sum eru viðskiftafólk í Norðoya Sparikassa, og hetta er eitt økið, sum er sera tætt tengt at fiskivinnuni – bæði á landi og sjógvi.

At fiskivinnan hevur havt tað gott seinastu tíðina merkist aftur hjá Norðoya Sparikassa.

– Stórur partur av okkara kundum fáa sína løn í framleiðsluvinnuni, og tí er gongdin hjá okkum tengd at hesi vinnu. Tað er uppá gott og ilt, og í løtuni kenna vit tað frá tí góðu síðuni, sigur Eyðfinn Reyðberg, stjóri.

Góðu tíðirnar hava eisini havt við sær, at fólk hava sett fleiri pengar í sparikassan. Innlánini vuksu við 100 milliónum krónum seinasta ár.

Balansin hjá Norðoya Sparikassa var fyri fyrstu ferð omanfyri milliardina og vendi, so sparikassin veksur.

## Lutvíst færri útlán

Hóast Norðoya Sparikassi hevur fingið fleiri pengar í kassan, hevur stovnurin ikki vaksið eins nógv um útlánini. Í 1999 vuksu útlánini við 100 milliónum krónum, meðan vøksturin í ár bert er góðar 20 milliónir.

– Vit broyta ikki útlánspolitikk frá einum ári til annað, men vit halda tað er hóskandi, at útlánini eru millum 80 og 90 prosent av innlánunum, sigur Eyðfinn Reyðberg.

Við árslok vóru útlánini 88,5 prosent av innlánunum. Í 1999 vóru tey 96 prosent.

– Tað eru fleiri pengar at vinna við at lána pengar út heldur enn at seta teir í virðisbrøv, men tað er sjálvandi eisini ein størri vági og kostnaður við at lána út, sigur Eyðfinn Reyðberg, sum fegnast um, at sparikassin í ár hevði kursvinning upp á tvær milliónir av síni lánsbrøvum.

## Tænasta í topp

Síðani 1994 eru vinnuligi útlánini hjá Norðoya Sparikassa farin frá ongum og upp í 27 prosent í fjør.

– Privatkundin hevur altíð verið høvuðsgrundarlagið undir Norðoya Sparikassa, og soleiðis verður tað eisini framyvir. Tað er tó sannlíkt, at vit fara at vaksa nakað um vinnuligu lánini komandi árini, sigur Eyðfinn Reyðberg.

Norðoya Sparikassi roknar við einum betri úrsliti fyri 2001.



*– Privatkundin hevur altíð verið høvuðsgrundarlagið undir Norðoya Sparikassa, og soleiðis verður tað eisini framyvir. Tað er tó sannlíkt, at vit fara at vaksa nakað um vinnuligu lánini komandi árini, sigur Eyðfinn Reyðberg, stjóri í Norðoya Sparikassa*

*Mynd: Eyðun Klakstein*

– Vit eru væl nøgd við úrslitið í ár, men vit skulu sjálvandi miðja eftir einum betri úrsliti. Men ein fíggjarligur málsetningur er lítið verdur, um tað ikki veruliga verður gjørt nakað fyri at náa honum.

– Lykilin til betri úrslit eru fleiri og betri nøgdir kundar. Tí skal tænastan og ráðgevingin verða so góð sum á nakran hátt gjørligt, sigur Eyðfinn Reyðberg.

Í gjárkvøldið hevði Norðoya Sparikassa stóran ábyrgdarafund í KÍ-høllini í Klaksvík, og har slapp nýggi stjórin at greiða frá gongdini farna árið.



*– Lykilin til betri úrslit eru fleiri og betri nøgdir kundar. Tí skal tænastan og ráðgevingin verða so góð sum á nakran hátt gjørligt, sigur sparikassastjórin í Klaksvik*

*Mynd: Eyðun Klakstein*


**NÝTT FRÁ TRIUMPH!**




Esclave bh fæst í A,B og C skál
einans 258,-

Esclave trussur
einans 128,-



Náttkjólar og pyamas
í bumull við
stuttum ella ongum
ermum
Prísur frá 268,-

Sosialurin 311820




Undirtroyggjur í bumull
118,-

Undirtroyggjur í
50% bumull 50% micro-model
130,- og 158,-

fæst eisini í ull

Skálabúðin
Dr. Jakobsensgøta 21 - Tel 315315